# ES-grundlógin hongur í kløttum tráði

**Fraklendingar atkvøddu sunnudagin nei til ES-grundlógina, og eygleiðarar meta, at grundlógin nú hongur í einum kløttum tráði.**

ES-GRUNDLÓGIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var greiður meirilut fyri einum fronskum nei til grundlógina. 54,87 prosent søgdu nei, meðan 45,13 prosent søgdu ja. Franski forsetin, Jacques Chirac, segði eftir, at úrslitið var almannakunngjørt, at tað var eitt afturstig fyri Frakland, men at úrslitið ikki fór at fáa fronsku stjórnina at umhugsa sín limaskap í ES.

### Fleiri lond tykjast ivasom

Franska nei'ið er eitt afturstig fyri tilgongdina til ES-grundlógina, og tað ger ikki støðuna betur, at tað eisini sær út til at enda við einum nei'ið í fleiri øðrum londum.

Millum annað fara hollendingar í morgin at greiða atkvøðu, og har benda veljarakanningar á, at úrslitið fer at gerast eitt nei.

Danir skulu atkvøða um ES-grundlógina tann 27. september, og nógvir danskir politikarar harmast um franska úrslitið. Millum annað kallaði fyrrverandi danski forsætismálaráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, sunnudagin fyri ein svartan dag í ES-søguni.

Onkur danskur flokkur hevur heitt á Anders Fogh Rasmussen, forsætismálaráðharra, um at avlýsa donsku fólkaatkvøðuna, men teir stóru flokkarnir standa saman um, at danir skulu á val 27. september. Báðir stjórnarflokkarnir, Venstre og Konservative, vilja hava fólkaatkvøðuna í heyst, og tað sama vilja eisini Sosialdemokratarnir og Radikale Venstre.

---

Jóannes Eidesgaard, løgmaður:

# – Neyðugt við kjaki um ES



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, heldur tað verða umráðandi, at føroyingar sum skjótast fáa eitt kjak um støðu okkara til ES.*
*Savnsmynd*

**At fraklendingar sunnudagin søgdu nei til ES-grundlógina, hevur neyvan ta stóru ávirkanina á Føroyar, heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður**

ES-GRUNDLÓGIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Løgmaður heldur tó, at úrslitið í Fraklandi sunnudagin gevur nakað av innanhýsis trupulleikum í ES, og hetta ger ikki okkara samráðingarstøðu betur.

### Ferðin verður sett niður

Jóannes Eidesgaard sigur, at úrslitið í Fraklandi kanska líka nógv er eitt mótmæli móti sitandi stjórn í Fraklandi, sum tað er eitt nei til ES-grundlógina.

- Tað er tó einki at ivast í, at talan er um ein kreppu í ES-høpi, tí Frankland er ikki eitthvørt ES-land. Frakland hevur verið við frá byrjan, og landið hevur kanska verið tað mest ES-sinnaða landið av øllum limalondunum. Tað er tí einki at ivast í, at tað er eitt øgiligt afturstig fyri tey, sum hava staðið aftan fyri tilgongdina til ES-grundlógina, at úrslitið í Fraklandi gjørdist eitt nei, heldur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður væntar, at úrslitið í Fraklandi fer at seinka Europeisku integratiónini, og um fleiri lond fara at atkvøðu nei, væntar Jóannes Eidesgaard, at ferðin á tilgongdini fer at stegða munandi upp.

### Noyðast at taka støðu

Í spurninginum um, hvørja ávirkan eitt danskt ja og ein møgulig samtykkjan av ES-grundlógini fer at hava fyri Føroyar, sigur Jóannes Eidesgaard, at her er støðan heilt greið.

- Tað stendur í forfatningini, at hon ikki er galdandi fyri Føroyar, og tí hava vit einki at óttast, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður heldur tó, at tað er neyðugt hjá okkum føroyingum sum skjótast at fáa eitt kjak um, hvat vit vilja, tí vit noyðast at taka støðu til spurningin.

- Vit noyðast at fáa eitt kjak, har vit taka støðu til, um vit eru nøgd við verandi støðu, ella hvat vit vilja. Sjálvur haldi eg, at tað er umráðandi, at vit taka støðu sum skjótast, tí óansæð hvørja niðurstøðu vit koma til, so er processin long, sigur Jóannes Eidesgaard.

---

Høgni Hoydal:

# – Franskt nei gevur okkum eitt skoðbrá

**Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, heldur, at tað gevur føroyingum eitt longri skoðbrá at lýsa egnar avleiðingar, at fraklendingar í sunnudagin atkvøddu nei til ES-grundlógina**

ES-KONVENTIÓNIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í dag verður orðaskifti í Fólkatinginum um, hvat eitt møguligt danskt ja til ES-grundlógina hevur at siga fyri Føroyar og Grønland. Tað eru teir tríggir fólkatingslimirnir í Norðuratlantsbólkinum, Høgni Hoydal úr Føroyum, og grønlendingarnir báðir, Kuupik Kleist og Lars-Emil Johansen, ið hava sett danska forsætismálaráðharranum, Anders Fogh Rasmussen, spurningin.



*Høgni Hoydal hevur biðið um eitt orðaskifti í Fólkatinginum, har Anders Fogh Rasmussen skal greiða frá, hvørjar avleiðingar tað fær fyri Føroyar og Grønland, um danir atkvøða ja til ES-grundlógina, og um grundlógin verður samtykt. Orðaskiftið verður í dag*
*savnsmynd*

### Skal ikki hava avleiðingar fyri Føroyar og Grønland

Í fyrispurningi sínum til forsætismálaráðharran spyrja teir tríggir fólkatingslimirnir, hvussu danska stjórnin tryggjar sær, at nýggja ES-grundlógin ikki á nakran hátt, hvørki poltiskt ella løgfrøðisligt, kemur at verða galdandi fyri Føroyar og Grønland.

Høgni Hoydal sigur, at Norðuratlantsbólkurin miðjar ímóti, at tað verður samtykt at gera eina óhefta kanning av, hvat ein økt ES-samansjóðan fer merkja fyri Føroyar og Grønland. Hesum hevur Anders Fogh Rasmussen áður sýtt fyri.

- Danir fara ivaleyst at trýsta fólkaatkvøðuna ígjøgnum í Danmark, óansæð hvussu úrslitið verður aðrastaðnis, og tað er tí umráðandi, at vit fáa lýst okkara støðu, sigur Høgni Hoydal.

### Mugu velja eina leið

Høgni Hoydal heldur, at tað hevur givið okkum føroyingum eitt longri skoðbrá at velja eina leið, at fraklendingar sunnudagin atkvøddu nei.

- Vit noyðast at velja eina leið, sum vit vilja ganga í hesum málinum, og nú hava vit fingið eitt longri skoðbrá at velja hesa leið, sigur Høgni Hoydal.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur tað verða burturvið at tosa um føroyskan ES-limaskap, so leingi vit eru partur av danska ríkisfelagsskapinum.

- Tað hevði verið skilabest, um vit gjørdu eina samstarvsavtalu við fyrst og fremst Noreg, Grønland og Ísland, tí vit hava felags áhugamál í Norðuratlantshavi, og saman høvdu vit staðið sterk, heldur Høgni Hoydal.

### Mótmæli til væntandi demokrati

Í morgin fara hollendingar at taka støðu til ES-grundlógina, og veljarakanningar í Hollandi benda á, at eisini har verður atkvøtt nei.

- Um hollendingar atkvøða nei, verður tað spennandi at síggja, hvat Tony Blair fer at gera. Fólkaatkvøðan í Bretlandi er útskrivað, men sigur Holland nei, kann tað verða, at Tony Blair fer at avlýsa bretsku atkvøðugreiðsluna, sigur Høgni Hoydal.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum tulkar franska valúrslitið sum eitt mótmæli til væntandi demokratiið í ES, og tað sama er galdandi, um hollendingar eisini siga nei.

---

Peter Holm, Kaupthing:

## - Sæst ikki aftur í búskapinum



Stjórin í Kaupthing, Peter Holm, dugdi mánamorgunin ikki at síggja nakað tekin um, at franska nei'ið hevði nakra búskaparliga ávirkan.

- Tað einasta, ið eg dugi at síggja, er at euroin er viknað eitt sindur í mun til dollarin. Verður dollarin styrktur, verða vit meiri kappingarfør í fiskivinnuni, serliga á upsaøkinum, sigur stjórin í Kaupthing.

**tn**